Jørgen á Áarvegnum:

Slapp bert at hava handil í tvey ár

Tað eru ikki færri enn tríggir við navninum Jørgen Frants Jacobsen jarðaðir í gamla kirkjugarði. Teir tveir eru kendi rithøvundurin og abbi hansara. Jørgen Frants, sum verður umrøddur í dag, fekk sítt navn frá abbanum í Vágum

Óli Jacobsen

200. partur

Tey eru fá, sum minnast Jørgen á Áarvegnum, men framvegis eru nógv, sum vita um hann og hansara ísinkramhandil, sum hann lat upp á Áarvegnum í 1931.

Pápi Jørgin Frants var Jacob Jacobsen (1846-1883), Jákup á Áarvegnum kallaður, timburmaður úr Havn. Abbin Joen (1804-1874) var eisini timburmaður. Langabbin var Jacob Christiansen (1761-1829), bóndi á Eystara Húsagarði í Havn. Hann festi 23.3. 1799.

Mamma Jørgin Frants var Anna Jørgensen f. 1846 úr Miðvági, vanliga kallað Vága Anna. Pápi hennara Jørgin Frants Jacobsen (1811-1890) var føddur í Havn. Kona hansara Rachel Niclasdóttir f. 1810 var úr Sandavági. Hetta man vera orsøkin til, at tey eru búsett í Miðvági, har Jørgin Frants var skúlalærari og handilsmaður.

Fór á háskúla fyri arvin

Jørgin Frants giftist við Maren Christinu Fredrikku Michelsen úr Øravík. Pápi hennara var Dánjal Jacob MIchelsen (1859-1935). Hann var skipari og timburmaður. Mamman var Karin Maria Poulsen (1861-1883) úr Hvalba. Hon doyði knappliga, áðrenn Marin Christina var ársgomul.

Marin Christina hevur verið rættiliga frammarlaga fyri sína tíð. Hon hevði frá mammu síni arvað »kolarættindi« í Hvalba. Hesi seldi hon og fór niður á Vallekilde á Háskúla. Eisini keypti hon eina seymimaskinu, sum hon fekk nógva nyttu burtur úr.

Virkin í sjúkrakassanum og nótafelagnum

Jørgen var ein virkin maður á nógvum økjum, eisini í sjúkrakassanum í Havn.

Í 1922 var aðalfundur í sambandi við samanlegging av tí gamla sjúkrakassanum í Havn og Thorshavns Afholdssygekasse.

Í nevndini fyri samanlagda sjúkrakassan komu, umframt Jørgen, eisini Petur Jensen, kendur m.a. frá meiarínum, Hans Kamban, Andreas Jensen, Jacob Lindenskov, Jacob Jacobsen, prentari og Anton Andrésen.

NYGGJUR HANDIL.

Í dag verður upplatin nýggja krambúð mín á Áarveginum.

Fyri hampuligan prís kann her fáast alt, ið vanlig húsarhald krevja av emaillerаðum og galvaniseraðum vörum, blikk- og a'uminium, galantarívørur av ymsum slag o. m. a.

Vitjið tí inn til mín!!

Við hávirðing

Jørgen F. Jacobsen

Telefon 217.

Lýsing frá Jørgen, tá ið hann byrjaði at handla

Handilin á Áarvegnum

Hetta var eitt tíðarskeið við fíggjarligum trupulleikum, og hetta merktist eisini í sjúkrakassanum, hóast limatalið hækkaða.

Okkurt mátti gerast fyri at spara, og á einum aðalfundi hevði nevndin uppskot um at seta tilskotið til heilivág niður frá ¾ til eina helvt. Men uppskotið fall. Jørgen var í nevndini til hann doyði.

Hann hevði eisini onnur álitisstørv. Hann hevði roknskapin hjá skipinum »Golden Harp«. Hann var eisini kassameistari hjá Nótafelagnum í Havn, og børnini hjá honum gingu til limirnar at krevja limagjald. Her var onkur stuttlig misskiljing, tá ið fólk søgdu seg einki hava við tónleik at gera. Men hetta var eitt felag, sum átti eina seiðanót.

Tingakrossi hevði hesi minningarorð um Jørgen

Tað vóru sorgarboð, sum bórust út um havnarbý 1. jóladagsmorgun (1933), tá ið tað frættist, at Jørgen Jacobsen, Jørgen á Áarvegnum, var deyður. Altíð nítur deyðin meint, tá ið hann rámar mann í sínum fulla yrki og meinari sjálvsagt, tess meira óvart hann kemur. Her kom hann enntá saman við sjálvari jólahátíðini, sum ein kaldur gjóstur til vinir og kenningar við síni óbøtandi sorg til tey næstu, ið eftir sita. Fáur grunaði, at so brádliga skuldi lívslagna hansara verða endað.

Ikki tí, hann hevði verið brekaður leingi av sukursjúku, men hann tyktist ikki at virða sjúkuna. Hann var ongantíð ein av teimum, sum gramdi seg um seg sjálvan. Tað lá hansara ljósa og glaða lyndi fjart. Stillfarandi og skemtingarsamur átti hann heldur evnini og hugin til at vekja áræði og treysti hjá øðrum. Mótloysi og vónloysi lá ikki fyri hjá honum.

Tað hava hansara felagsmenn í føroyskum sjálvbjargnisstarvi so mangan sannað, og hann var ein ósvíkjandi starvsbróður í tí, sum í øllum øðrum størvum, hann tók sær uppá.

Í 25 ár var Jørgen Jacobsen í krambúðini hjá Ludvig Poulsen í Havn. Sum unglingur hevði hann verið í Thomsens handli á Tvøroyri, og var nú byrjaður sína egnu krambúð á Áarveg. Men nú tók sjúkan at herja við lungnabruna og svulli, og hon gjørdi skjótt um seg.

Legan var stutt, men hansara seinastu tímar vóru svárir. 51 ár untist honum at liva. Í honum hava vit mist ein góðan mann, ein trúgvan og erligan føroying, óræddur og frælslyntur, ein av teimum, vit hava minst ráð til at missa.

Heiðrað veri minni hansara.

Stuðlaði deyða manninum á løgtingsvali

Tá ið Jørgen var deyður fór Marin Christina at taka móti logerandi, og har búðu nógv. Dømi er Janus Djurhuus og eisini Rigmor, sum hann livdi saman við.

MAREN C. JACOBSEN
F. 8.8. 1882 - D. 27.12 1963
JØRGEN F. JACOBSEN
F. 3.8. 1882 - D. 25.12. 1932
TAKK FYRI ALT

KAREN DANIELLA JACOBSEN
F. 8.2. 1919 - D. 7.9 1932
JESUS SAGDE: GRÆDER IKKE
HUN ER IKKE DØD MEN SOVER

Marin Christina og Jørgen saman við børnunum. Vinstrumegin pápan standa Jákup og Karin. Frammanfyri tey eru Hanna Betty og Anna. Mamman situr undir Hákuni og uttast til høgru stendur Jona

Hoyrdi nú um dagarnar í samband við valið, eina stuttliga søgu um Marin Christinu. Hon valdi sambandsflokkin og hann sjálvstýrisflokkin. Tey vóru bæði íðin í síni politisku støðu. Tá ið Marin Christina fyrstu ferð fór á val at velja sambandsflokkin eftir, at Jørgen var deyður, hittir hon onkran, sum sigur við hana: »Tú fer nú kanska at velja fyri Jørgen.« Tá kemur henni til hugs, at hetta er kanska tann einasti beini, hon nú kundi gera sínum deyða manni. So hon atkvøddi fyri sjálvstýri restina av lívinum!

Børnini hjá teimum báðum vóru:

Jacob f. 1911. Giftist við Onnu f. Djurhuus úr Søldarfirði.

Karin Daniella (1913-1932). Hon doyði brádliga bert 19 ára gomul.

Hanna Betty (1916-1985). Gift við Herluf Hansen politisti (1910-1976).

Anna f. 1918. Var í Danmark undir krígnum. Arbeiddi nógv ár í handlinum hjá Katrinu Christiansen. Bert hon livir eftir av systkjunum.

Jona Helena f. 1914. Hon fór til Danmarkar áðrenn kríggið og giftist. Hon arbeiddi nógv í KFUM niðri.

Hákun (1921-2009). Giftist við Marju Poulsen f. 1926 úr Nólsoy.

Keldur:
Viggo Christiansen
Karin Joensen

200. partur

Hetta er partur nummar 200 í hesi røð, sum er nógv meira enn væntað var frá byrjan. Nú fer kortini skjótt at vera komið runt. Tað verða bert nakrar greinir afturat, sum framyvir fara at koma triðju hvørja viku. Er onkur, sum hevur tilfar um steinar, sum eftir eru, eri eg fegin um at frætta.

Tað eru um 300 gravsteinar í kirkjugarðinum. Av hesum eru nú um 250 steinar umrøddir.

Ein slík grein sýnist einsamøll ikki av nógvum. Men tilsamans man vera talan um 600 tekstbókasíður og um 1.000 myndir, sum lýsa fólk, sum fingu teirra seinasta hvíldarstað á Svínaryggi. Tað hevur eisini víst seg, at tað hevur verið sera stórur áhugi millum lesarar fyri hesi røð.

Í komandi parti um tríggjar vikur verður greitt frá Sigrid Pállson, undangongukvinna í kvinnufráhaldsfelagnum